

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 10 - 2012

# Shell skal í rættin fyri dálking

Oljufelagið Shell er nú í rættinum í Niðurlondum fyri at verja seg í einum sakarmáli, sum fimm nigeriskir bóndur hava lagt ímóti felagnum, tí eftir teirra tykki hevur felagið ikki gjørt nóg mikið fyri at forða fyri álvarssamari oljudálking í Niger-ósanum. Fyrsti rættarfundur um málið var í gjár, og áhugin er stórur, tí úrslitið av hesum málinum kann fáa avleiðingar fyri onnur oljufeløg, sum ikki vanda sær nóg væl um umhvørvið, sum tey arbeiða í. Teir fimm nigerisku bóndurnir hava fingið stuðul frá umhvørvisfelagsskapinum Friends of the Earth til at reisa rættarmálið ímóti oljurisanum, sum eftir teirra tykki drálaði við at tetta lekan á einari rørleiðing við tí úrsliti, at nakrar bygdir og stór landbúnaðarøki blivu dálkað. Visti av lekanum -Shell var leingi vitandi um, at leiðingin lak, men felagið gjørdi einki við tað. Teir kundu havt steðgað lekanum, sigur sakførarin hjá bóndrunum, Channa Samkalden, við niðurlendskar fjølmiðlar. Ein av teimum fýra saksøkjarunum, Alfred Akpan, greiddi rættinum frá, at oljan frá lekanum hevði dálkað 47 hyljar, sum hann hevði havt til at ala fisk í, og at hetta hevði givið honum álvarssamar trupulleikar, tí hann og húskið livdu av alingini. Oljuvinnan í Nigeria hevur í mong ár elvt til umfatandi dálking í Niger-ósanum. Shell er tað oljufelagið, sum er mest virkið í Nigeria.